Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Eyðdis Hartmann Niclasen, løgtingskvinna

Svarari: Ruth Vang, landsstýriskvinna í fíggjarmálum

Evni: Tvískattaavtalur

Spurningar:

1. Er arbeiðið at kanna møguleikarnar fyri at fáa fleiri tvískattaavtalur fyri føroyska vinnulívið og føroyingar yvirhøvur ella handilsflotan og shippingvinnuna sett í gongd?
2. Hvussu verður arbeiðið skipað?
3. Nær kann væntast, at nakað úrslit ella ein frágreiðing fyriliggur?

Viðmerkingar
Í mars mánaði í ár varð uppskot til samtyktar (lm. nr. 72/2022) lagt fram við eini áheitan um, at landsstýrið skal leggja fyri Løgtingið eina frágreiðing um, hvussu farast skal fram fyri at samráðast um fleiri tvískattaavtalur fyri Føroyar.

Tá ið málið var á skrá í tinginum, tóku umboðini fyri allar flokkar væl ímóti uppskotinum og málið fekk eina jaliga viðgerð og bleiv samtykt. Sum skilst kann hetta gerast rættiliga drúgt at fáast við og tí er alneyðugt at tryggja, at gongd er á arbeiðinum.

Reiðarafelagið fyri Handilsskip hevur støðugt víst á, at tørvur er á fleiri tvískattaavtalum. Føroyar hava í dag einans átta tvískattaavtalur við onnur lond, og tað er ikki eydnast at økja um talið av hesum avtalum seinastu mongu árini. Til samanberingar kann nevnast, at Danmark hevur fleiri enn 70 tvískattaavtalur við onnur lond.

Fleiri tvískattaavtalur kunnu m.a. vera við til at geva føroyingum og vinnuni betri virkisfrælsi og eina betri kappingarstøðu uttanlands. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 19. oktober 2023

Eyðdis Hartmann Niclasen